# Claus og teir vunnu aftur

Blackpool kom aftur á beint í næstbestu ensku fótbóltsdeildini, tá ið liðið leygardagin vann heimadystin ímóti Leicester. Fyrrverandi føroyski landsspælarin Claus Bech Jørgensen var við á liðnum hjá Blackpool allar 90 minuttirnar. Blackpool kom á odda tíðliga í dystinum, men í seinna hálvleiki javnaði Leicester. 20 minuttir fyri tíð var fyrrverandi skotski landsliðsspælarin Paul Dickov skiftur inn, og hann gjørdi sigursmálið hjá Blackpool stutt fyri leiklok.



# Balling bankaði landslið

Danska felagið Vejle er á venjingarlegu í Karibien, og har spældu teir leygarkvøldið venjingardyst ímóti landsliðnum hjá St. Kitts. Vejle vann dystin heili 4-1, og tríggjar ferðir var tað fyrrverandi NSÍ-álopsspælarin Ulrik Balling, sum skoraði. Slatur gekk í vetur um, at Balling skuldi koma aftur til NSÍ at spæla, men hetta vóru bara leysasøgur.

Kyndil-Neistin 27-21 (14-8):

# Best í høvuðs-staðnum

**Triðju ferðina á rað vunnu Kyndils-kvinnur á Neistanum. Hesa ferð við sannførandi sigri, har ivi ongan tíð var um vinnaran**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki av tilvild, at Kyndil er annað liðið í steypafinaluni. Kanska var lutakastið ikki heilt óheppið, tá Stjørnan og VB vórðu noydd at avgreiða eina hálvfinalu sínamillum. Men fyrst og fremst, so hava tær grønu sjálvar greitt sína skyldu í so máta.

Týdningarmesta stigið í so máta var helst, tá Kyndil í fjórðingsfinaluni basti Neistakvinnum. Ein dystur, sum bæði undirstrikaði, at sigurin í landskappingini í desember mánaði ikki var av tilvild. Men eisini ein sigur, sum undirstrikaði støðugu framgongdina, sum Kyndilskvinnur hava havt í vetur. Ein framgongd, sum eisini hevur havt við sær, at tað er at kalla sum dagur og nátt, um avrikini í dag og fyri fýra mánaðum síðani verða sammett.

## Verjan avgjørdi

Og framgongdin var eisini sjónlig frá fyrsta bríksli sunnudagin. Ferðin á spælinum var so nógv hægri hjá Kyndli, enn hon var tað hjá Neistanum, og alt fyri eitt byrjaðu tær at draga frá móttstøðuni.

Stóri trupulleikin hjá Neistanum hevur í alt ár verið mangulin upp á skotsterkar bakspælarar. Og tann trupulleikin gerst ikki minni, nú Ása Dam á Neystabø hevur verið uttan fyri við skaða í eina tíð.

Kyndil kundi tí alla tíðina halda fast um fløtu 6-0 verjuna, har tær tó eisini dugdu at koma út, tá Neistin royndi at koma til skot, og soleiðis væl stuðlað av verjuni hevði Guðrun í Lágabø tí ein av sínum heldur lættari døgum.

Samstundis ansaði Kyndil støðugt eftir, at tær ikki góvu nøkur kontraálop frá sær. Júst tann parturin hevur fram um alt annað verið styrkin hjá Neistanum í vetur, men glið fekst heldur ikki á hetta. Serstakliga tí verjuspælið í longum pørtum av dystinum var alt ov tamt.

## Finaluklárar

Og sum dysturin leið, so gjørdist munurin millum lið og mót- ávikavist viðráki alt sjónligari. Hóast ungar kreftir sum Edit Dahl Olesen og Elin Holm góvu Neistanum nakrar glottar til vantandi bakspælið, so er tað ov nógv kravt, um hesar einsamallar skulu lyfta liðið.

Og hjá Kyndli var støðan at kalla tann øvugta. Hvør sum ein stuðlaðu spælararnir upp undir hvørja aðra, og júst tann viljin verður ivaleyst týdningarmesti liðurin, tá tær komandi vikuskiftið skulu spæla steypafinalu.

Hvussu langt hetta ber, er tó ilt at meta um. Tí eingin ivi er um, at Stjørnan er stórfavorittur til steypafinaluna. Líkamikið hvør móttstøðan er.

Men sum Kyndil hevur tikið seg fram seinastu mánaðirnar, so eru orðini frá Stjørnu-venjaranum í 3-2 kanska ikki heilt av leið. Tá segði Henrik Gerster nevnliga, at tað var púrasta rættvíst, at Kyndil er mótstøðuliðið í finaluni. Hetta tí Kyndil í løtuni hevur næst besta liðið í landinum.

Um ikki annað, so hava tær undirstrikað, at tær í løtuni eru besta kvinnuliðið í høvuðsstaðnum.



*Í nógvum førum sluppu grønu Kyndils-kvinnurnar mest sum inn at málteiginum, áðrenn verjuspælari kom út at tackla*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA**

**Kyndil-Neistin 27-21 (14-8)**
**10 min:** 4-2
**20 min:** 8-5
**40 min:** 21-12
**50 min:** 25-18
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Lina Andriulyte 5, Eyðritt Andreasen 5(1), Randi S. Wardum 5, Jacklin Durhuus 4, Ronja Mikkelsen 4, Tordis Tróndarson 3, Súsanna Petersen 1
**Neistin:** Nikoleta Radu Hansen 5, Elin Staksund 4, Elin Holm 3, Edith Dahl Olesen 2(1), Rakul Augustinussen 2, Rakul Magnussen 2, Anja Heinadóttir 2, Unn Kragesteen 1
**Brotskøst:** Kyndil 1, Neistin 3
**Útvísingar:** Kyndil 3, Neistin 2
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen.

StÍF-Stjørnan 27-33 (14-18):

# Stjørnan buldrar víðari

**Maktfaktorurin í føroyskum kvinnuhondbólti kundi í løtum taka sær av løttum, tá tær syftu StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ofta hevur StÍF argað Stjørnuna. Eisini hóast tað á stigatalvuni hevur verið langt millum liðini seinnu árini.

Men á Skála sunnudagin var tó ikki tann heilt stóri ivin. Stjørnan var komin undir Leirvíksfjørð eftir stigunum, og tann spurningin lótu tær ongan tíð nakran iva vera um.

Fyrstu løtuna høvdu gestirnir sær sjálvum so líkt trupult við at finna veruliga stevið, men so við og við tóku tær veruliga dik á seg. Og hóast munurin ikki var tann heilt stóri í steðginum, so mundi heldur eingin á heimaliðnum ivast tað minsta um, at sigurin skuldi fara til gestirnar. Heldur ikki hóast Rebekka Justinussen hesa ferð prógvaði sína mest sum ræðandi skotstyrki.

Og eftir steðgin var søgan hin sama. Stjørnan rullaði seg kanska ikki veruliga út, men tær hildu alla tíðina dystinum í einum jarntaki. Og seinastu minuttirnar settu tær enn eina ferð trumf á við at at vísa, at tær eisini kropsliga eru betur fyri enn nakað av mótstøðuliðunum.

**FAKTA**

**StÍF-Stjørnan 27-33 (14-18)**
**10 min:** 5-7
**20 min:** 7-11
**40 min:** 18-23
**50 min:** 24-26
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 11(3), Fríðrunn Danielsen 6, Oddrún Danielsen 4, Rósa Johansen 2, Ninna K. Johansen 2, Bára B. Danielsen
**Stjørnan:** Simona Petersen 10, Durita Ljósstein 5(1), Durita Christophersen 5, Anna Kristina Samson 4, Una Olsen 4, Durita Ljósstein 2, Edith Hansen 2, Ella Petersen 1(1)
**Brotskøst:** StÍF 4, Stjørnan 4
**Útvísingar:** StÍF 3, Stjørnan 2
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg